ítróttur

Nr. 92 • hósdagur • 19. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Dómarar til próvtøku

**Gongst eftir vild, kunnu Føroyar longu mánadagin hava nýtt altjóða dómarapar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið skulu bæði kvinnur og menn royna seg móti grannunum úr Íslandi í hondbóltslandsdystum á ávíkavist Eiði og í Havn.

Hetta er sjálvandi ein góð styrkisroynd hjá hondbóltslandsliðum okkara, men tað verða tó ikki hesi, sum fyrst og fremst standa í fokus.

## Kunnu fáa altjóða góðkenning

Tað verða hinvegin dómarapørini, sum koma at vera undir sjóneykuni í teimum fýra dystunum, sum tilsamans skulu spælast. Og tað eru eisini dómararnir, sum eru fremsta orsøkin til, at dystirnir yvirhøvur verða spældir.

Tað er nevnliga føroyska hondbóltsdómarafelagið, sum hevur arbeitt fyri at fáa dystir í altjóða flokki í Føroyum. Ætlanin hevur leingi verið, at fáa eitt nýtt føroyskt dómarapar, eftir at hesin leiklutur í fleiri ár varð røktur av Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Ein leiklut, sum Kristian seinnu árini hevur røkt saman við donskum makkara, eftir at borgaliga starvið hjá Hjalmari fór avstað við ov stórum parti av orkuni.

Sjálvur hevur Kristian bara tvey ár eftir, áðrenn hann fellur fyri aldursmarkinum, og hann staðfestir, at tað hevur stóran týdning, at nýtt dómarapar sleppur at taka yvir á altjóða pallinum.

- Vit hava leingi havt eitt ynski um, at Hannis og Uni skulu fáa møguleikan at royna seg á hægri støði. Sjálvur havi eg eisini roynt at arbeitt við hesum, tí eg haldi tað vera sera týdningarmikið, at vit varveita okkara altjóða status í so máta.

- Vit hava tosað um ymiskar loysnir, men skuldi dystur spælast í Føroyum, so var neyðugt við tveimum dystum, har dómararnir verða settir á vágskálina. Eftir at hava tosað við HSF, eydnaðist okkum so at fáa íslendingar hendanvegin, og tá teir so kundu koma við báðum liðunum, læt tað upp fyri møguleikanum við tveimum føroyskum pørum til próvtøku.



*Tað hevur leingi verið eitt føroyskt ynski at fáa Hannis og Una Wardum upp til altjóða próvtøku. Nú verður hetta veruleiki. Enntá við tveimum pørum, tí eisini Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen hava í ár troka seg upp móti føroyska dómaratindinum. Millum annað við heitinum sum ársins dómarapar, valt av spælarunum*

## Próvtøka í tríggjar dagar

Umframt Hannis og Una Wardum verða tað Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen, sum skulu undir sjóneykuna um vikuskiftið, og einki er at ivast í, at talan verður um nakrar krevjandi dagar.

Fríggjdagin skala fysiski formurin standa sína roynd við bæði rennitestum og heilsukanningum. Hartil verða allir fýra kallaðir inn til samrøðu, sum partvíst skal staðfesta, at talan er um dómarar, sum veruliga ynskja at vera við á hægsta stigi.

Leygardagin verður fyrsti dysturin so dømdur, og hesin verður sjálvandi eftirmetur. Skrivlig roynd er eisini á skránni, og sunnudagin skal so aftur dømast. Men hesaferð við eftirmetingini frá leygardegnum í huga, so metast kann, um dómaranrir eisini megna at tillaga seg til krøvini frá eygleiðaranum.

Gongst alt hetta eftir vild, so kann verða, at føroyingar longu mánadagin hava nýtt altjóða dómarapar. Kristian sjálvur sigur eisini, at endamálið fyrst og fremst er at fáa eina innstilling, og er dømingin nøktandi, verða tey bæði føroysku pørini innstillað sum ávíkavist nummar eitt og tvey.

- Vit skulu nokk ikki rokna við, at vit fáa tvey altjóða pør í einum, men minni enn tað kann so eisini gera tað, sigur Kristian.

## Altjóða kapasitetur

Talan verður annars um ein kapasitet av teimum heilt stóru, sum skal eyg- og vegleiða føroysku pørini um vikuskiftið.

Terje Anthonsen hevur í fleiri ár verið ein av fremstu norsku hondbóltsdómarunum. Nú eru nøkur ár síðani, at hann legði floytuna á hillina, men framvegis er hann sera virkin. Í dag verður hann mettur sum ein av fremstu dómaraeygleiðarunum og – instruktørunum í heiminum, og umframt sessin í norsku hondbóltssambandinum, hevur hann eisini sæti í fleiri altjóða nevndum viðvíkjandi hondbóltsdøming.